> **… onkuntíð hevur sæð verri út, enn tað ger í dag…**
>
> JÓHAN JOENSEN, REIÐARI



**DUGDUR**



*Hendan túrin er Bjarni Petersen skipari. Saman við fimm øðrum kollfirðingum eigur hann Arctic Viking*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Her við bátahylin eru felagshølini hjá Kollafjarðar Bjargingarfelag. Formaður felagsins seinastu árini er Snæbjørn Hansen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Bjargingarfólk gera sjálvboðið hjálparарbeiði

**BJARGING - Kollafjarðar Bjargingarfelag hevur stívliga 70 limir, og vit eru til reiðar hjálpa til, tá brúk er fyri okkum, sigur formaður felagsins seinastu árini, Snæbjørn Hansen**

Vilmund Jacobsen

Felagshølini hjá Kollafjarðar Bjargingarfelag liggja við bátahylin í Kollafirði. Ein nevnd við fimm limum umframt eykalimum stendur aftanfyri felagið. Limatalið liggur um stívliga 70 og alt arbeiði, sum gjørt verður, er sjálvboðið.

Felagið í Kollafirði hevur tætt samstarv við eitt nú Havnar Bjargingarfelag og Nólsoyar Bjargingarfelag, eins og felagið í Kollafirði er limur í LFB, sum er landsfelagið hjá føroyskum bjargingarfeløgum.

Formaður felagsins seinastu fimm árini er Snæbjørn Hansen.

Hann sigur, at felagið í Kollafirði er stovnað seinast í fimmtiárunum ella um sama mundið, sum Havnar Bjargingarfelag varð stovnað.

## Eingin sløkking

- Í sínari tíð var sløkkilið og bjargingarlið sama felag, og tá hevði felagið eisini pumpur, eins og sjúkrabilur var í Kollafirði. Nú virkar felagið sum bjargingarfelag burturav, ið tekur sær av leitingaruppgávum og ymiskum hjálparuppgávum.

Snæbjørn Hansen sigur, at Kollafjarðar Bjargingarfelag eisini er úti um seg, tá illveður er um vetrarnar, og ymiskt leyst kanska liggur og sløðist.

- Um tekjur ella klædningar ríva, ella um vingeygu fara í knús, tí leyst liggur og fýkur, eru vit sjálvsagt til reiðar at hjálpa fólki sum koma í slíkar støður, leggur hann aftrat.

Kollafjarðar Bjargingarfelag er annars til reiðar til allar hjálparuppgávur, har tørvur er á tí, og felagið kann gera mun.

> **… vit eru til reiðar at taka okkum av leitingaruppgávum og ymiskum hjálparuppgávum…"**
>
> SNÆBJØRN HANSEN

## Eisini manna Lív

Teir stívliga 70 limirnir, sum eru í felagnum, arbeiða ymsastaðni kring landið, og tí er ikki altíð so lætt at savna limirnar til felags aktivitetir.

- Vit royna tó at verða saman av og á, og annars hevur LFB regluligar fundir, har limafeløgini – og soleiðis eisini Kollafjarðar Bjargingarfelag – eru við.

Snæbjørn Hansen sigur, at í framtíðini er ætlanin, at felagið í Kollafirði eisini skal verða við til at manna bjargingarbátin Lív, sum annars verður rikin av Havnar Bjargingarfelag við Jens Hansen sum útgerðarmanni.

- Vit kundu hugsað okkum at verið við í eini skiftisskipan um bátin, men hetta krevur, at vit hava fólk, sum eru tøk til at taka sær av hesi uppgávu, sigur formaðurin í Kollafjarðar Bjargingarfelag.

vilmund@sosialurin.fo